Kommunufelagið

Samferðslumálaráðið
Tinganes
Postrúm 64
110 Tórshavn

Dagfesting
22. januar 2018

Okkara j.nr.
18/00128-2

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr.
S3005-006/17

**Viðv. kunngerð um koyrikort og koyrifrálæru**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskotið um broytingar í koyrikortkunngerðini, ið er sent felagnum til hoyringar.

Í sambandi við at reglurnar vórðu broyttar soleiðis, at koyrikort til lítil prutl kann latast persóni, ið hevur fylt 15 ár, fingu kommunurnar til uppgávu at veita hesum bólki undirvísing í koyrifrálæru. Flestu kommunurnar hava átikið sær at veita ungdóminum hesa frálæru.

Hinvegin vísir tað seg, at skipanin tykist at vera óneyðuga tung bureaukratisk og kostnaðarmikil, bæði fyri borgaran og umsitingarnar, og við nýggja uppskotinum verður hetta ikki gjørt léttari.

Hóast hetta er ásett í lógini og sum so ikki viðvíkur sjálvari kunngerðarbroytingini, so sýnist ikki at vera nøkur serliga haldbar grundgeving fyri skilnaðinum millum, at ein persónur kann taka koyrikort til lítið prutl (avmarkað til 30 km/t sum mestu háferð) sum 15 ára gamal og síðani til stórt prutl (avmarkað til 45 km/t sum mestu háferð) sum 16 ára gamal. Harumframt verður tað við broytingini nú við teirri treyt, at viðkomandi hevur havt koyrikort til lítið prutl í minst 1 ár.

Fyri tað fyrsta tykist henda treyt púrasta ólogiskt, tí um viðkomandi er fyltur 16 ár og ikki ynskir ella hevur ynskt at taka koyrikort til lítið prutl, men bert til stórt prutl, merkir broytingin so, at viðkomandi noyðist at taka koyrikort til lítið prutl, áðrenn til ber at fáa koyrikort til stórt prutl? Spurningurin er eisini, um henda treyt er í samsvari við í ásetingarnar og kunngerðarheimildirnar í § 18 í ferðslulógini?

Harnæst sýnist markið millum 15 og 16 ár at vera íkomið av tilvild heldur enn eini gjøgnumhugsaðari tilgongd fyri, hvussu ein persónur skal mennast í atferð og hugburði til ferðslu og ferðslutrygd. Sum skilst, er stórur partur av grundarlagnum undir koyrikortkunngerðini danskur leistur. Ein avgerandi munur í føroysku og donsku reglunum er tó, at eftir donsku reglunum skal persónurin vera fyltur 18 ár, áðrenn viðkomandi kann fáa koyrikort til stórt prutl, meðan persónur kann fáa koyrikort til stórt prutl sum 16 ára gamal eftir føroysku reglunum.

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**

Kommunufelagið

Føroysku reglurnar eru sostatt linari, men hetta gevur samstundis eina óhepna avleiðing í ósmidliga skiftinum millum at ungdómur fyllir 16 ár og kann skifta frá lítlum til stórt prutl.

Kommunufelagið dugir illa at síggja meining í kommunurnar skulu nýta kommunalar ressoursir uppá at røkja ein uppgávu, sum í veruleikanum er ein landsuppgáva, um hetta heldur ikki yvirskipað sæð, er liður í eini skilagóðari skipan.

Vísandi til omanfyri standandi er Kommunufelagið heldur ivasamt um broytingina í kunngerðini viðvíkjandi koyrikorti til prutl, tí hetta eftir felagsins tykki ger støðuna ógreiðari enn frammanundan og fer felagið tí heldur at mæla til, at øll skipanin við koyrikorti til prutl til ung undir 18 ár verður endurskoðað, fyri at fáa eina meira skilagóða skipan, ið er borgaranum at gagni og er einføld og løtt hjá viðkomandi myndugleikum at umsita.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo